# Samandráttur av fundi í Hvalbiar sóknar kommunu 24. mai 2011

Møtt vóru: Otto West, Trygvi Midjord, Martin í Nesi, Niels Olaf Eyvindsson, Herdis Jensen, Rúni Thomsen og Niels J. Thomsen.

Fundurin varð settur kl. 18.05.

Eftir at fundarskráin fór út, eru fimm mál komin inn aftrat. Formaðurin bað um loyvi at taka hesi við - hetta varð játtað og koma tey inn sum mál nr. 10, 11, 12, 13 og 14 á skránni.

1. **Umsókn um stuðul til ferð frá 8. flokki í Hvalba.**
   Samtykt varð eins og undanfarin ár at stuðla við kr. 500,- pr. persón.

2. **Skriv um á millum hús.**
   Samtykt varð at heita á Vatnsýnisnevndina um at fara á staðið og kanna umstøðurnar.

3. **Umsókn frá Hvalbiar skúla um lørift og fleiri stólar til fimleikahøllina.**
   Samtykt varð at geva loyvi til at keypa lørift. Viðvíkjandi stólum, varð samtykt at bíða við at keypa hesar til komandi ár, tá nýggir møblar skulu keypast.

4. **Umsókn um sundurbýti av matr. nr. 170c.**
   Samtykt varð at viðmæla sundurbýti.

5. **Umsókn um byggiloyvi á matr nr. 170c.**
   Samtykt varð at geva byggiloyvi út frá givnum upplýsingum, tekningum v.m. treytað av, at økið verður góðkent sum sethúsaøki í nýggju byggisamtyktini.

6. **Umsókn um sundurbýti av matr. nr. 389b.**
   Samtykt varð at viðmæla sundurbýti.

7. **Møguligt keyp av matr. nr. 51a í Hvalba.**
   Í sambandi við at matr. nr. 51a er lýst til sølu, varð samtykt at kanna prís v.m. til næsta fund.

8. **Byggisamtyktin.**
   Uppskot til byggisamtykt fyri bygdirnar Hvalba, Nes og Sandvík frá 2011 – 2023. Samtykt varð at fáa kannað, um nøkur forðing er fyri, at kommunan kann geva byggiloyvi í teimum hvítu økjunum.

**9. Støðutakan til kostnaðarmetingar frá HMP Consult**.

1. Planering Nes:

Samtykt varð at fáa HMP Consult at bjóða arbeiðið viðv. neystaplássi 1 og 2 út beinanveg.

2. Vegur Hólar:

Samtykt varð at fáa HMP Consult at bjóða 1. byggistig av uppskot 01 út.
(Skriv til eigararnar fyrst, har kunnað verður um ætlanirnar).

3. Uppdyrkingarvegir og gøta:

Samtykt varð at taka málið uppaftur seinni og seta pening av á komandi fíggjarlóg.

**10. Umsókn um stuðul til Summer Camp 2011 frá TB/Royn.**

Samtykt varð at stuðla við kr. 2.000,-.

**11. Skriv frá Hvalbiar skúla.**

Samtykt varð, at hetta kemur uppí útbjóðingina hjá HMP Consult av arbeiðinum við umvæling av skúlanum.

**12. Skriv um ampar av djórahaldi.**

Samtykt varð at gera eina reglugerð viðvíkjandi hesum og annars kanna, hvussu aðrar kommunur hava loyst trupulleikan við tílíkum.

**13. Umsókn um stuðul frá SSP-samtakinum í Suðuroynni.**

Samtykt varð at stuðla hesum við kr. 150,- pr. næming komandi ár, t.v.s. uml. kr. 1.050,-.

**14. Skriv um rulluportur.**

Samtykt varð at geva noktandi svar til hetta.

**15. Skriv viðv. Rituskor.**

Samtykt varð at gera weir framvið og seta upp skelti við ávaring, havandi trygdina hjá ferðafólki og øðrum í huga. Trivnaðarnevndin tekur sær av, at hetta verður gjørt.

Samtykt varð at gjalda kr. 150.000,- av eykarokningini.

**16. Ikki alment mál.**

Fundarbókin lisin og skrivað undir.

Fundurin lokin kl. 22.15.